

# Vesturvarði og Vesturskin í Sørvági

Partrolararnir Vesturvarði og Vesturskin vóru á Sørvági mánadagin við tilsamans 240.000 pundum av upsa, sum teir fingu eystanfyri. Tað var Landingarmiðstøðin í Sørvági, sum landaði veiðina hjá skipunum. Djúpvatnstrolarin Brestir, sum er heimahoyrandi í Sørvági, hevur eisini verið inni við umleið 120.000 pundum, meginparturin kongafiskur og blálonga. Teir hava roynt sunnanfyri og løgdu veiðina upp í Lochinver. Brestir er longu farin aftur til fiskiskap.



*Hendan myndin gevur eina hóming av, hvussu mong vaksin luttóku á dansiskeiðnum á Toftum fríggjadagin og leygardagin*



*Anna Kirstin Thomsen og Mia Cameron undirvístu. Tær høvdu gott tak á skeiðsluttakarunum*





